


**Nr. 1** ***5. januar 2025*** **85. árg.**

# Hav gott treysti

*„Síðani herdi eg hugin“ (Ezra 7,28)*
*tað vil siga, eg ernaðist, fekk árræði, nýtt mót.*

Tað eru so mong nú á døgum, hvørs lívstreysti er brotið. Tey halda, at alt er so syrgiligt og tungt, og kanska hevur lívið eisini farið illa við teimum. Men tað er eitt, sum tey gloyma, og tað er, at lívstreystið kanst tú bara eiga saman við trúartreysti. Vit mugu byrja við trúartreysti. Lívið er ein gáva frá Gudi, og Hann hevur eina ætlan við sínari gávu. Tað jarðiska lívið er nevniliga ikki nóg mikið í sær sjálvum. At vera til er ikki tað sama sum at liva. Vit skulu tvørturímóti brúka lívið at vinna lívið, og tað lívið er bara at finna í Guds soni, okkara Harra. Sum hin gamli ápostulin Jóhannes orðar seg: „Tann, sum hevur sonin, hevur lívið; tann, sum ikki hevur Guds son, hevur ikki lívið.“ (1. Jóh. 5,12).

Øll tey mongu, sum ikki hava Guds son sum sín Frelsara og Harra, sum sín sálarvin og trúnaðarvin, tey hava altso ikki lívið. Tey eru til, men tey eiga ikki tað, sum gevur tilveru teirra innihald, meining og treysti, og hvussu skuldu tey so kunna varðveitt lívstreystið? Tað er høpisleyst at vilja eiga lívstreystið uttan at eiga lívið.

Og tí – tú, sum situr tungur í huga og vónbrotin, lumpa ikki teg sjálvan við teimum óektaðu vørunum (doyvingarevnunum ella rúsevnum), men lurta eftir ápostlarøddini: at bara tann, sum hevur Sonin, hevur lívið. Herð teg so í huga og legg teg í Guds hendur.

Lat evangeliið koma inn í lív títt og í títt hjarta. Lat tøkkina fyri Guds náði gjøgnumseyra títt lív og lat teg upp fyri Guds

vilja. So fáa dagar tínir nýtt innihald, og tú sjálvur fært nýtt lívstreysti, og so kemur tann dagur, tá ið eisini tú kanst vitna: „Eftir Harranum bíða! Hav gott treyst, tak mót í hjarta og Harranum bíða!“ (Sálm. 27,14).

*Sk-P „Kirkeklokken“ – Effie Campbell umsetti.*

# Tíð

*Kristina Zorba Jenssen*

## Gjárdagurin er farin!

*Morgindagin kenna vit ikki! Dagurin í dag er ein gáva!*
***Njót hann** – og brúka hann til fulnar!*

**Vit liva í einari tíð,** har menniskju meir og meir liva undir pressi og strongd. Hjálparfólk á sjúkrahúsum, ellis- og røktarheimum og dagstovnum verða uppsøgd, hóast tað ikki eru færri sjúklingar, gomul fólk ella børn, sum skulu røktast og ansast. Tað eru færri hjálparfólk, sum skulu gera arbeiðið – men tað tykist, sum tíðin ikki røkkur.

Eg veit, hvussu tíðin skorar á, tí eg eri mamma til fimm børn í aldrinum frá níggju til hálvtannað ár. Eg havi lisið síðani 2004 og eri beint nú farin undir seinasta part av mínari útbúgving. Altso, sum eg haldi, at eg havi verið undir tíðarpressi. Men sannleikin er sjálvandi, at Gud hevur skapað døgnið við 24 tímum og vikuna við 7 døgum – og tað er gott fyri menniskjuna at halda hvíludagin.

Eg vildi so fegin dugað at brúkt tíðina rætt, so at eg ikki í heilum livi undir einum pressi. Hjálp mær Gud!

Ímynda tær ein banka, sum hvønn morgun setur 86.400 kr. inn á tína konto. Hvørt kvøld verður hvør króna, sum tú ikki fekst brúkt gjøgnum dagin, strikað. Hvat hevði tú gjørt? Tikið hvørt oyra út sjálvandi.

Hvør einasti okkara hevur ein tílíkan banka. Navnið á honum er **TÍÐ**. Hvønn morgun verða 86.400 sekund sett inn á tína konto. So nógv sekund eru í einum døgni. Hvørt kvøld avskrivar hann sum tap alt tað, sum tú ikki fekst sett í eitt gott endamál. Eingi sekund verða flutt til dagin eftir – og yvirtrekk er ikki loyvt.

Hvønn dag letur hann eina nýggja konto upp fyri tær. Hvørt kvøld verða dagsins restir brendar. Um tú letur vera við at brúka dagsins innogn, so er tapið títt.

**Virðismet tíðina.** Tú skalt liva í løtuni við dagsins innskoti. Ger íløgur við tí á ein hátt, so tú fært besta avkastið í heilsu, eydnu og gleði og til gagns fyri onnur. **Tíðin rennur. Fá tað besta burtur úr hvørjum degi!**

***Um tú skalt*** skilja virði av **EINUM ÁRI**, spyr so ein lesandi, sum dumpaði til próvtøkuna.

***Um tú skalt*** skilja virði av **EINUM MÁNAÐI**, spyr so eina mammu, sum hevur føtt eitt barn ov tíðliga.

***Um tú skalt*** skilja virði av **EINARI VIKU**, spyr so hann, sum gevur út eitt vikublað.

***Um tú skalt*** skilja virði av **EINUM MINUTTI**, spyr so ein, sum júst er komin ov seint til tokið.

***Um tú skalt*** skilja virði av **EINUM SEKUNDI**, spyr so ein, sum júst við neyð og deyð slapp undan einari vanlukku.

***Um tú skalt*** skilja virði av **EINUM MILLISEKUNDI**, spyr so ein, sum fekk silvurheiðursmerki á olympiaduni.

Virðismet hvørja løtu, sum tú hevur! Og minst til – **tíðin bíðar ikki eftir nøkrum!**

**Gjárdagurin er farin!**
**Morgindagin kenna vit ikki!**
**Dagurin í dag er ein gáva!**
**Njót hann – og brúka hann til fulnar!**

*Effie Campbell* umsetti.

# Gud ja! Men Jesus?

Í 1976 kom ein bók út, sum æt „Gud ja! Men Jesus?“ Tað var Wilhelm Busch, sum størsta partin av lívi sínum var ungdómsprestur í Essen, sum skrivaði hana.

Menniskju kunnu saktans taka Gud í sín munn, men tá ið tey skulu nevna Jesus, tá vil tungan ballast, og tey hava torført at siga navn hansara – uttan, tá ið tey blóta og banna! Hví man tað vera so? Jú, tí øll frelsan hongur uppi í Jesusi. Gud hevur ikki knýtt frelsuna upp í seg, men hann hevur sett ein millummann millum okkum og seg. „Tí at ein er Gud, ein er eisini millumgongumaðurin millum Guds og manna, maðurin Kristus Jesus, sum gav seg sjálvan sum loysigjald fyri øll.“ 1. Tim. 2,5–6. Hvussu fáa vit lut í hesum? Við at taka ímóti tí.

„Men so mongum, sum tóku ímóti honum (Jesusi), teimum gav hann mátt (ella: rætt) til at verða Guds børn, teimum, sum trúgva á navn hansara.“ Jóh. 1,12.

Hví blíva vit ikki frelst við bara at trúgva á Gud? Tí heimurin er fullur av sonevndum „gudum“, sum ikki eru annað enn avgudar. „Tann, sum hevur sonin, hevur lívið; tann, sum ikki hevur Guds son, hevur ikki lívið.“ 1. Jóh. 5,12. Jesus sjálvur sigur: „Eingin kemur til faðirin uttan við mær.“ Jóh. 14,6.

Tað er bara ein røtt trúgv, sum vit kunnu liva og doyggja uppá: tað er trúgvin á Jesus Kristus, son Guds. Jesus hevur sjálvur sagt: „Í faðirs míns húsi eru mangir bústaðir.“ Jóh. 14,2. Men tað eru bara einar dyr til Guds bústaðir: „Eg eri dyrnar. Gongur nakar inn um meg, skal hann verða bjargaður (frelstur).“ Jóh. 10,9.

Jesus er dyrnar! Men tað vilja summi fólk ikki hoyra um. Eg sigi tær: Bara trúgvin á Jesus Kristus, Guds son, er ein bjargandi og frelsandi trúgv, sum vit kunnu liva og doyggja uppá.

*Effie Campbell.*

---

**Tað nýggja ættarliðið** hyggur ikki at sínum pengum sum sínar egnu, men sum eitt amboð í Guds hondum. *e.c.* ums.

**Sunnudagsblaðið**
**ynskir øllum eitt**
**av Harranum signað nýggjár**

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 5. jan. | **Tekstur:** | Luk. 1,5–25 | **Bíbliuorð:** | Luk. 18,27 |
| 12. jan. | **Tekstur:** | Luk 1,57–68 + 76–80 | **Bíbliuorð:** | Sl. 143,8 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74




**Nr. 2** ***19. januar 2025*** **85. árg.**

# Hjartahúsið

Einaferð var tað ein maður, sum búði í einum húsi, sum var skapað sum eitt hjarta. Eitt kvøldið, tá ið hann sat uttan fyri húsið, kom eitt skitið landastrok yvir til hansara og spurdi, um hann kundi sleppa at sova í einum króki í einum av kømrum hansara. Hann, sum átti húsið, svaraði: „Ja, tú kanst sleppa at sova her í nátt, men tú mást fara aftur beinanvegin í morgin ári.“

Hetta gekk landastrokið inn uppá. Tá ið hann spurdi landastrokið, hvat ið hann æt, fekk hann at vita, at hann æt Øvundsjúka.

Tá ið morgunin kom, vildi landastrokið ikki fara og bað lova sær at vera eina nátt afturat. Hann, ið húsið átti, vildi, at hann skuldi fara; men hann var ikki nóg sterkur at fáa landastrokið út. Og soleiðis bar tað til, at Øvundsjúka bleiv búgvandi í húsinum.

Eitt kvøldið kom Øvundsjúka heim við einum vinmanni. Hann æt Sjálvgóður og vildi eisini búgva í húsinum. Seinni kom Øvundsjúka heim við trimum øðrum vinmonnum. Teir itu Hatur, Óndskapur og Synd.

Hann, ið átti húsið, bleiv móður av at hava øll hesi vánaligu fólkini hjá sær og segði við tey, at tey øll skuldu fara, av tí at tey næstan høvdu trokað hann burtur úr hansara egna húsi; men teir svaraðu: „Vit fara ikki.“

Hann, ið átti húsið, fekk síðani fatur á øllum teimum bókum, hann átti í húsinum, og sóknaðist og leitaði fyri at finna útav, hvussu hann skuldi sleppa av við Øvundsjúku, Sjálvgóðsku,

Hatur, Óndskap og Synd. At enda fann hann svarið í Bíbliuni. Guds orð segði, at um hann lovaði Jesusi inn í sítt hjartahús, so vildi sonur Guds fáa hinar út úr húsinum, tí teir kundu ikki búgva saman við Jesusi. Hann, ið átti húsið, bað hesa bøn:

*Jesus, kom inn, Jesus, kom inn.*
*Kom inn í mítt hjarta, Jesus.*
*Kom inn í dag, koyr synd avstað.*
*Kom inn í mítt hjarta, Jesus.*

Og beinanvegin kom Jesus inn í hansara hjartahús, og alt fyri eitt hvurvu landastrokini. Og tá ið hann nú ynskti sær tað rætta slagið av vinmonnum, tók Jesus sínar góðu vinir við sær: Kærleika, Gleði, Frið, Góðsku og Trúgv.

Og tit, vinir mínir, eiga øll eitt hjartahús. Dámar tykkum, at vánalig landastrok skulu búgva hjá tykkum? Um tit biðja hesa bøn, sum hesin maðurin bað, so vil Jesus koma inn í tykkara hjarta og taka kærleika og gleði og frið og góðsku og trúgv við sær. Vilja tit ikki biðja hann um at koma inn í dag?

„Sí, eg standi við dyrnar og banki uppá. Um einhvør hoyrir rødd mína og letur upp dyrnar, tá skal eg fara inn til hansara og eta nátturða saman við honum, og hann við mær.“ (Opb. 3,20).

*„Kirkeklokken“* – *Effie Campbell* umsetti.

# Lat teg ikki leiða í freistingar

*Unni Fredstad talaði á Visjon Norge.*
***Har segði hon m.a. soleiðis:***

Eg havi eina vinkonu. Einaferð ringir hon til mín og sigur, at hon nú er farin at fáast við tað okkulta, og tað er so spennandi. Eg svari henni aftur, at hetta er av tí ónda, og eg royni at siga við hana, at tað tykist kanska spennandi í fyrstani, men um eina tíð fer hon at merkja, at hon fær tað ógvuliga ringt innan í sær. Men hon heldur fast við sítt.

So gongur ein tíð. So ringir hon aftur og sigur, at hon merkir, at okkurt ónt er komið inn í seg, og at hetta vil hon ikki hava. Hon spyr, um eg kann hjálpa sær.

Eg svari henni aftur, at hon má avnokta alt tað ónda, og hon skal taka hvønn setning upp eftir mær. Eg fari so undir at siga trúarjáttanina: „Eg avnokti djevulin og allar gerningar hans, og allan atburð hans ….“ Og hon tekur tað upp eftir mær. Tá ið eg

eri liðug at siga trúarjáttanina, letur í henni: „Tú, nú merkti eg, at okkurt ónt í hjarta mínum fór út. Sum tað er gott. Takk, at tú vildi hjálpa mær.“ Vit mugu halda okkum burtur frá øllum okkultum, tað er ikki at spæla við.

*Effie Campbell.*

# Sig „Gud vælsigni teg“

*„Legg navn mítt á ísaelsmenn,*
*so skal eg vælsigna teir.“ 4. Mós. 6,27.*

Guds orð er sprenfult av lívi, vísdómi, sannleika, kraft og av ónýttum møguleikum. Tá ið Hann skapaði heimin, segði Hann heilt einfalt: „Verði …“ Hvørt orð Hann sigur – hevur í sær megina at skapa tað, Hann sigur. Hvørt lyfti, Hann gevur, goymir í sær fræini at uppfylla hetta lyftið. Fræini hava eina fastlagda „árstíð“, har tey bera frukt í lívi tínum, og tá ið tey verða vatnað við álitisfullari bøn, og tú stendur fastur á orði Hansara, meðan tú bíðar eftir Hansara røttu løtu – so kunnu Orð Hansara ikki svíkja.

Tá ið tú skilir henda sannleikan, verða orðini „Gud vælsigni teg“ av sonnum ómetaliga sterk! Tá ið vit siga fram hesi orð, verða Guds signingar leyslatnar og loystar niður yvir okkara lív. Tá ið tú sigur: „Gud vælsigni teg,“ stuðlar Gud tær. „Tá ið tú vælsignar … fólk … í mínum navni, vil eg sjálvur vælsigna tey.“ So um tú vilt vælsigna tíni kæru, sig so hesi signingarorðini yvir tey: Harrin vælsigni teg og varðveiti teg! Harrin lati andlit sítt lýsa yvir teg og veri tær náðigur! Harrin lyfti upp ásjón sína yvir teg og gevi tær frið.“ (Vers 24–26).

Um tú spyrt onkran: **„Hvussu hevur tú tað?“** so er tað ein fólkalig málbering og vísir, at tú ert umhugsin. Og tá ið tú sigur: „Mítt ynski er, at dagurin má gerast tær góður,“ so meinar tú tað av sonnum. Men tá ið tú sigur „Gud vælsigni eg,“ og skilir bíbilska týdningin av hesum orðunum, kann Guds signing broyta lívið hjá hesum fólki!

*„…et Ord til Dagen“ – Effie Campbell* umsetti.

# Undir Frelsarans blóði eg hvíli

Eg minnist, sum var tað í gjár, eina nátt í Bangkok fyri nøkrum árum síðani. Tað var um fýra tíðina um náttina. Ein vinmaður og eg skuldu til eina flóttalegu við einum bussi, sum fór so

tíðliga á morgni. Vit høvdu rullað soviposarnar út aftan fyri nakrar runnar einar 200 metrar frá bussstøðini, og har høvdu vit so sovið einar tveir tímar.

Tá ið vit pakkaðu viðførið saman, sóu vit skuggar og skepilsi rundan um okkum, og eftir einari løtu hevði eitt harkalið, sum taldi einar tjúgu ungar menn, kringsett okkum. Eftir øllum at døma vóru vit givnir upp til skutils, og vit vóru ein lættur fongur. Vit høvdu ongan livandi kjans. Einasti møguleiki okkara var, at Himmalin legði uppí.

Og tað gjørdi hann. Vinmaðurin og eg fóru at syngja kórið „Under Frelserens blod jeg hviler!“ Og vit hildu á at syngja, meðan vit pakkaðu. Ímeðan tók rumbul seg upp í harkaliðnum. Vit skiltu teir ikki; men tað ljóðaði, sum munnhøgdust teir, og teir rendu undir hvør annan.

Minuttirnir kendust sum tímar. At enda tóku vit ryggsekkirnar upp á herðarnar og fóru gangandi avstað – og teir lótu okkum fara.

Hetta var einki minni enn hin altvaldandi Gud, sum kom sær upp í leikin. Hvørja einastu nátt leypa ránsmannalið á menniskju, lamløsta og drepa tey fyri nakrar fáar krónur. Men okkara tími var ikki komin. Tí vóru teir ikki førir fyri at ríva okkum úr hond Hansara.

*Moses Hansen, Blæs Alarm. - Effie Campbell* umsetti.

---

**William Ward sigur:** „Vit seta adressu og frímerki á ein brævbjálva og senda hann avstað í fullum áliti á, at hann fer at koma fram til tað staðið, har hann er ætlaður. Og kortini undrast vit og ivast, um okkara bønir verða hoyrdar av einum altíð nærverandi og kærleiksfullum Gudi.“ Jesus sigur: „Faðirin skal geva tykkum, hvat tit so biðja hann um í navni mínum.“ Jóh. 15,16.

*e.c.* ums.

---

Størst kvettið er at taka ímóti Jesusi. *e.c.* ums.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 19. jan. | **Tekstur:** | Luk. 2,21–23 + 36-38; 3,21–23a | **Bíbliuorð:** | Luk. 3,22b |
| 26. jan. | **Tekstur:** | Matt. 4,18–22 | **Bíbliuorð:** | Matt. 4,19 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74